HVANNASUNDS KOMMUNA

**Barnahúsið IMBA søkir eftir:**

**einum pedagogi at byrja 01. desember 2020.** Um eingin pedagogur søkir, kann hjálparfólk vera sett í starvið tíðaravmarkað, frá 01. desember 2020 til 23. Desember 2021

Í barnahúsinum IMBA hava vit børn í: vøggustovu, barnagarði, skúlabólk og frítíðarskúla.

**Vit kunnu bjóða tær:**
Eitt pedagogstarv á 32 tíma viku í vøggustovu, sí starvstreytir undir Starvsstaður.

**Søkt verður eftir starvsfólki, sum:**
hevur, mildleika, virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrum og starvsfeløgum

er jaligt, tekur ábyrgd og hevur góð samstarvsevnir.

hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan, mennandi, tryggan og stuttligan gerandisdag saman við børnunum.

er sjálvstøðugt, álítandi, nærverandi og nærløgd.

sær møguleikar fram um forðingar.

**Vit kunnu bjóða:**
ein stovn við góðum innandura og uttandura spæliplássi
ein stovn, ið liggur mitt í náttúruøki, beint millum haga, fjøru og fótbóltsvøll

**Setanarviðurskifti:**
Lønar- og setanartreytir sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

**Starvsstaður er Barnahúsið IMBA**,
tann, ið settur verður, skal kunna starvast við øllum børnunum á stovninum, og um stovnurin og leiðslan, hevur tørv á tí, má starvsfólkið kunna flyta ímillum stovurnar, ella flyta stovu.

Umsókn við prógvi, og møguligum viðmælum/royndum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin 25. november 2020, kl. 15:00

Nærri kunning um starvið fast við at ringja til leiðaran, tlf. **735891**

Umsóknin skal sendast til: t-post: barn@hvannasund.fo